## Messi skoraði hattrick

Argentinski stórspælarin Lionel Messi var í hopla í gjárkvøldið. FC Barcelona spældi á heimavølli ímóti Sevilla, og eftir ein málleysan fyrra hálvleik tók Messi fat í seinna hálvleiki. Stutt eftir steðgin skoraði hann til 1-0, eftir ein góðan solotúr ígjøgnum verjuna. Eftir at Valenica síðani fekk ein spælara útvístan, skoraði Messi tvey mál afturat, og tryggi sigurin ger, at Barcelona heldur seg í hølunum á oddaliðnum Real Madrid.



## Higuain dugir eisini

Ein annar argentiskur spælari skoraði eisini hattrick í sponsku landskappingini í gjárkvøldið. Gonzalo Hiuguain spælir fyri oddaliðið Real Madrid, og hann var í rætta essinum í dystinum ímóti Valladolid. Cristiano Ronaldo legði Real Madrid á odda, og síðani skoraði Higuain trý mál fyri kongafelagið, sum vann dystin 4-1. Harvið heldur Real Madrid fast um oddastøðuni í sponsku landskappingini.

### Mjølnir-SÍ 2-3 (25-20, 21-25, 23-25, 25-12, 12-15):

# Finaluforsmakkur við fimm settum

**Toppdysturin í hjá flogbóltsmonnunum kundi farið báðar vegir, men tá avtornaði var SÍ kaldari í fimta setti og streyk avstað við oddasessinum og heimavøllinum í møguligu triðju finaluni**



Hilmar Jan Hansen

SÍ vann sær oddasessin í seinasta dystinum í Eik-liguni hjá monnum, tá tað á útivølli eydnaðist at vinna á Mjølnir leygardagin. Mjølnir hevur annars verið á odda líka síðani oktober mánað, men í evstu løtu eydnaðist SÍ at yvirhála.

Dysturin í Badmintonhøllini í Klaksvík var bæði endurtøka av steypafinaluni og ein finaluforsmakkur hjá monnunum, tí leingi hevur verið greitt, at SÍ og Mjølnir skulu spæla FM-finalurnar. Í løtum livdu liðini eisini leygardagin upp til, at tey eru finalistar, men aðrar løtur var tað kanska heldur linligari.

Sørvingar løgdu væl út í fyrsta setti og vóru á odda 8-4, áðrenn Mjølnir raknaði við. Liðini fylgdust uppeftir til 15-15, men so fór Mjølnir framum 17-15 og megnaði at halda stand og vann fyrsta sett. Hinvegin var SÍ á odda fyri tað nógva í øðrum setti, sum SÍ eisini vann, so nú stóð 1-1 í settum.



Fimm sett máttu til, áðrenn toppdysturin í Eik-liguni hjá monnum millum Mjølnir og SÍ kundi avgerast

Mynd: Álvur Haraldsen

### Javnt fimta sett

Triðja sett gjørdist tað besta í dystinum, tí har vóru nógvar duellir og drúgvir bóltar. Mjølnir vann tær flestu av teimum og sá út til at skula taka settið. Men SÍ fylgdi væl við, so Mjølnir ongantíð slapp avstað. Støðan var 23-23, tá spælandi Mjølnirvenjarin, Boban Ilic, var óheppin at smasja í netið, so SÍ slapp framum, og so lá væl fyri hjá sørvingum at taka síðsta bóltin og settið.

Skelkurin var tó ikki størri enn so hjá Mjølnir, enn at liðið veruliga tók seg saman í fjórða setti og herjaði á. SÍ fekk ikki eitt bein til jørðina, men fekk ein veruligan avsmurning. Mestsum beinanvegin kom Mjølnir framum 13-3, og henda leiðslan var bara útbygd gjøgnum settið.

Sostatt stóð 2-2 í settum og eitt fimta og avgerandi sett skuldi spælast. Her gjørdi seg aftur galdandi, at liðið fylgdust øgiliga væl, umframt at tey eisini spældu væl og góvu áskoðarunum gott undirhald. Fyrstu løtuna var tað Mjølnir, sum fór eitt stig framum, áðrenn SÍ javnaði, og síðani var tað SÍ, ið fór hetta eina stigið framum og Mjølnir javnaði.

Flestu bóltarnir vóru bara sera, móttøka og smasj, men sum settinum leið, vórðu álopsspælararnir báðu megin netið varnrari og tordu ikki ordiliga at avgera. Men tá støðan var 12-12, fekk SÍ í evstu løtu spælt seg betur ígjøgnum og tikið settið og sigurin.

Tað merkir, at verður einki avgjørt, eftir at SÍ og Mjølnir hava spælt tær báðar fyrstu finalurnar leygardagin og sunnudagin, verður tað SÍ, sum í Sørvági fær heimavøll í triðju finaluni.

### ÍF-Fleyr 0-3 (18-25, 19-25, 18-25):

## Skuldi bara spælast

Dysturin á Kambsdali leygardagin, har menninir hjá ÍF tóku ímóti Fleyr, var í roynd og veru uttan týdning fyri nakran, tí ÍF slapp ikki av stigaleysa botnplássinum og Fleyr fekk bronsuna, óansæð úrslitið. Hetta var longu greitt fyri fleiri vikum síðani.

Hvørki av liðunum hevur havt eitt kappingarár, ið verður skrivað í søguna hjá feløgunum. ÍF, sum vann greipuna í fjør, hevur havt eitt nógv yngri og óroyndari lið í ár, og hóast onkur sett eru vunnin, er talan um 18 tap í 18 dystum. Hetta árið skulu fuglfirðingar bara gloyma sum skjótast.

Fleyr fekk eftir dystin leygardagin handað bronsumerkini, men tað er neyvan tað, liðið hevði ætlað sær, tá árið byrjaði. Ikki færri enn seks ferðir hevur Fleyr spælt fimmsettarar ímóti teimum báðum ovaru liðunum, SÍ og Mjølnir, men av teimum eru fimm taptir. Marginalarnir hava bara ikki verið við.

Leygardagin kom ÍF betur frá byrjan og var á odda 17-12 í fyrsta setti, men tapti tað kortini 18-25. Í teimum báðum seinnu settunum var Fleyr skjótari úr startholinum, og hóast ÍF hevði hug at nærkast, vann Fleyr bæði settini trygt, so talan gjørdist um ein 3-0 sigur, áðrenn manningin hjá havnarliðnum fekk bronsuheiðursmerkini handað.

hil